## Ógvuslig gjøld fyri heilsueftirlit

**Vanligan dag 920 krónur um tíman. Yvirtíð 1180 krónur um tíman. Náttartíð, sunnu- og halgidagar 1440 krónur um tíman. Tað eru gjøldini fyri at gera heilsugóðkenningar hjá eitt nú alivirkjum. Tað er ov ógvusligt, heldur Henrik Old, formaður í vinnunevndini**

HEILSUGJØLD
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað er dýrt at fáa heilsumyndugleikarnar á vitjan.

Sambært kunngerð nr. 124 frá 2001 um gjøld fyri veterinerar kanningar og eftirlit er ásett gjald fyri góðkenning í samhandlinum millum ES og Føroyar. Tað snýr seg um váttan, kanning ella eftirlit við dýrum ella úrdráttir úr dýrum – her undir koma laksavirkini.

Grundupphæddin fyri at gera eftirlit er 135 krónur. Harumframt vera 230 krónur tiknar fyri hvør ásett korter millum klokkan 6 og 17 gerandisdagar. Millum klokkan 17 og 22 skulu gjaldast 295 krónur fyri hvørt korter. Um náttina, leygardag eftir klokkan 14 og sunnu- og halgidagar skulu gjaldast 360 krónur fyri hvørt korterið.

Við øðrum er taksturin hesin fyri at fáa vitjan av heilsumyndugleikunum: Vanligan dag 920 krónur um tíman. Yvirtíð 1180 krónur um tíman. Náttartíð, sunnu- og halgidagar 1440 krónur um tíman.

– Hetta eru ógvuslig gjøld, sigur Henrik Old, formaður í Vinnunevndini hjá løgtinginum, og hann hevur tí sett Bjarna Djurholm, landsstýrismanni við vinnumálum, ein fyrispurning.

Henrik Old vil hava landsstýrismannin at svara sær, um hann heldur gjøldini vera rímilig. Løgtingið samtykti hósdagin 23. oktober, at fyrispurningurin skal svarast.

Útnorðurfundur í Oslo:

# ES-trøllið skal jarðast

**Londini í útnorði tykjast samd um, at ein felags umsiting av rávørutilfeinginum hevði verið ein góður trumfur, ið hevði munað væl í altjóða høpi. Jonathan Motzfeldt, formaður í Útnorðurráðnum, helt onga orsøk vera at ræðast ES, um vit samstarva tættari, men norskir politikarar eru meiri varnir at taka økt útnorðursamstarv á tunguna**

ÚTNORÐURFUNDUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Jonathan Motzfeldt, formaður í Útnorðurráðnum, mælir til, at tjóðirnar í útnorði gevast við at ræðast ES og í staðin fáa sær eina felags støðu til Evropasamveldið*

*Mynd: Jens K. Vang*

Eina felags umsiting av tilfeinginum. Tað var helst ítøkiligasta uppskotið til eitt samstarv millum londini í útnorði, tá umboð fyri Ísland, Føroyar, Grønland og Noreg fyri fyrstu ferð hittust á útnorðurfundi í Oslo um vikuskiftið.

Viljanum til samstarv bilar einki. Spurningurin er bara, hvussu eitt samstarv í útnorði kann standa stóra ES-veldinum kurl, og tað snúði ein partur av kjakinum seg um á útnorðurfundinum.

Pallborðsluttakararnir vóru Jonathan Motzfeldt, landstingsformaður í Grønlandi, Siv Friðleifsdóttir, norðurlandaráðharri í Íslandi, Anfinn Kallsberg løgmaður og Høgni Hoydal varaløgmaður úr Føroyum. Tingfólk úr londunum vóru eisini møtt, og tilsamans mundu vera eini 60 luttakarar á fundinum, sum Norsk-færøysk lag bjóðaði til.

### Felags tilfeingi

Umframt støðuna sum strandalond í Norðurlantshavi hava londini eisini tað til felags, at tey standa uttan fyri Evropasamveldið, sum stendur í vøkstri.

Jónathan Motzfeldt, formaður í Útnorðurráðnum, mælti til, at tjóðirnar gevast við at ræðast ES og í staðin fáa sær eina felags støðu til ES.

– ES er ein veruleiki, vit noyðast at góðtaka. Vit noyðast eisini at tosa við ES um annað enn fisk. Vit noyðast at gevast at ræðast ES. Felagsskapurin er ein veruleiki, og vit kunnu ikki kasta okkum undir teppið, hvørja ferð onkur sigur ES hart, segði Jonathan Motzfeldt.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, legði dent á, at útnorðursamstarvið gevur londunum møguleika til sínámillum samstarv, men minst líka týdningarmikið er sterka støðan, sum londini kunnu hava, um tey samstarva sum ein felags partur mótvegis ES.

– Føroyar hava royndir frá seinastu meira enn hundrað árunum við fiskiskapi í øllum Norðuratlantshavi. Fyri okkum hevur tað stóran týdning, um londini í útnorði kundu fingið eina felags umsiting av náttúrutilfeinginum, sum er sjálvt grundarlagið undir okkara tilveru, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum fekk stuðul frá bæði Íslandi og Grønlandi í hesum spurningi.

### Norðurlendskt OPEC

Vanliga síggja londini í útnorði seg sum eina útjaðara í mun til stóra ES-marknaðin. Høgni Hoydal, varaløgmaður, mælti frá hesum hugsanarhátti.

– Vit eiga ikki at síggja okkum sjálv sum ein útjaðara, men sum sjálvan kjarnan. Um vit seta passaran niður í Føroyar og snara honum, so liggja Føroyar mitt í Norðurlondum, og um tjóðirnar í hesum økjum samstarva, so er eingin ivi um, at vit fáa meira ávirkan – bæði innan norðurlendska samstarvið og á øðrum samstarvsøkjum, segði Høgni Hoydal.

Hann mælti eins og Anfinn Kallsberg til, at londini í útnorði samstarva um rávørutilfeingið og endurtók sítt uppskot um eitt norðuratlantiskt OPEC, har arbeitt verður fyri at fáa sum mest burturúr tilfeinginum.

### Felags umhvørvi

Siv Friðleifsdóttir er umframt norðurlendskur ráðharri eisini íslendskur ráðharri í umhvørvismálum. Hon helt spurningin um havumhvørvið vera av alstórum týdningi fyri londini í útnorði.

– Vit hava nógv til felags, og vit hava nógv samstarv. Okkum dámar øllum hval, og vit byggja okkara búskap á inntøkur frá fiskivinnuni. Hetta ger, at vit hava ein felags áhuga í, at havið eisini í frameftir verður liviligt hjá fiski og súgdjórum. Tí noyðast vit at standa saman ímóti dálkingini av havinum. Fleiri hóttanir eru, sum vit mugu berjast ímóti, segði Siv Friðleifsdóttir.

Russiski oljuflutningurin fram við norsku strondini, dioxin, teknesium og annar umhvørviseitur frá ídnaðinum í Evropa eru átrokandi mál, sum londini í útnorði eiga at taka upp í einum felags átaki, helt íslendski umhvørvisráðharrin.

– Um vit samskipa okkara sjónarmið betur og standa saman í fleiri málum, so kunnu vit gerast ein sterk eind. Eg eri sera bjartskygd fyri útnorðursamstarvinum, sum eg rokni við kemur at geva okkum øll nógv frameftir, segði Siv Friðleifsdóttir.

### Norsk tøgn

Noreg er helst sterkasta trumfkortið hjá útnorðurlondunum, men norskir politikarar vilja helst ikki tosa um eitt tættari samstarv í útnorði. Royndir at fáa málið fyri Stórtingið hava ført til, at málið er druknað í fyrisitingini.

Ein er kortini, sum heilhjartaður roynir at tosa fyri einum tættari samstarvi við Føroyar, Ísland og Grønland. Tað er hvalaveiðimaðurin og stórtingspolitikarin Steinar Bastesen. Hann upplýsti á pallborðsfundinum, at hansara flokkur Kystpartiet á landsfundi um vikuskiftið samdist um at arbeiða fyri einum tættari samstarvi. Flokkurin vil eisini hava Grønland, Ísland, Føroyar og Noreg at flyta fiskimarkið út á 250 fjórðingar fyri at tryggja eitt betri eftirlit við tilfeinginum.

ítróttur
Nr. 204 • týsdagur • 28. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Landsliðið móti donskum liði



*Føroyska manslandsliðið í hondbólti fær nú tveir venjingardystir móti Team Helsinge úr bestu donsku deildini*

**Hós- og leygardagin skal føroyska manslandsliðið í hondbólti royna seg móti danska Team Helsinge**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Føroyska manslandsliðið í hondbólti hevur longu havt nakrar venjingar, og aftur hetta vikuskiftið er tíð sett av á dystarskránni, soleiðis at tað verður landsliðið og ikki landskappingin, sum verður í fokus.

Í mun til vanligu vikuskiftini av hesum slagnum, har talan í stóran mun hevur verið um venjingar og so onkran dyst móti úrvalsliðum, so verður talan hesaferð um vitjan av donskum liði.

Lars Nedergaard, landsliðsvenjari, hevur fingið í lag eina vitjan frá Team Helsinge, sum í løtuni liggur á næst niðasta plássinum í donsku TDC-liguni.

Tað er tó lítið at ivast í, at hóast niðarligu plaseringina í donskum hondbólti, so kann liðið væl vera eitt hóskandi mótstøðulið hjá okkara monnum, og vónin er í øllum førum, at talan verður um tveir javnar, spennandi og ikki minst læruríkar dystir hjá okkara monnum.

Fyrri dysturin millum liðini verður hóskvøldið klokkan 20.30, og verður tann dysturin leiktur í KÍ-høllini í Klaksvík. Seinni dysturin verður í Vestmanna fríggjadagin, og verður tað somuleiðis klokkan 20.30.

## Hópirnir

**Føroyar**

| | |
|---|---|
| Eli Müller | VÍF |
| Oli C. Djurhuus | KÍF |
| Sámal Joensen | VÍF |
| Finnur Hansson | Kyndil |
| Ingi Olsen | VÍF |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil |
| Heini Bendsen | H71 |
| Heini H. Joensen | TMS, Ringsted |
| Áki Mørk | Neistin |
| Ragnar Stakksund | Neistin |
| Alexandur Johansen | StÍF |
| Sveinur Justinussen | StÍF |
| Marius Joensen | IF Stadion |
| Áki G. Olsen | VÍF |
| Janus Einar Sørensen | Kyndil |
| Bent Djurhuus | StÍF |
| Tróndur Joensen | Team Amager |

**Venjari:** Lars Nedergard
**Hjálparvenjari:** Hjalmar Klein Olsen
**Liðleiðari:** Jákup Durhuus
**Fysioterapeutur:** Rudi Hansen

Team Helsinge
Jacob Christensen
Mikkel Tønners
Sigustein Arndal
Rasmus Haagensen
Ulrik Villadsen
Kasper Klitgaard
Jesper Monrad
Morten Duelund
Ronald Wozniak
Theis Husfeldt
Martin Bager
Niclas Jensen
Zoran Rakic
Michael Gorm
Krister Lindgren
Peter Allfors

**Leiðarar**
Bjørn Pedersen, venjari
Anne-Dorthe Madsen
Helge Østergaard
Klaus Brodersen

# Rúni tekur tvey ár afturat



*Rúni Nolsøe og HB eru komin ásamt um, at samstarvið millum partarnar í øllum førum skal halda tvey ár afturat*

Talan verður neyvan um tær heilt stóru broytingarnar hjá føroyameistarunum í HB komandi árið. Tó at tað enn ikki er greitt, hvør skal hava venjarauppgávuna í komandi kappingarári, so hevur leiðslan í felagnum hildið fast um, at tað í størst møguligan mun verður sami leikarahópurin, sum enn einaferð fer at stríðast um gullið.

Sum liður í hesum er sáttmáli nú skrivaður við liðskiparan seinnu árini, Rúna Nolsøe, soleiðis at hesin í øllum førum tekur tvey ár afturat í felagnum.

Rúni er í dag 32 ára gamal, so tað fer at benda tann vegin, at vágbingurin í HB eisini fer at enda síni fótbóltsár her. Hóast hann omanfyri verður nevndur »vágbingurin í HB«, so er tó lítil ivi um, at viðhaldsfólkini í HB síggja Rúna sum ein av sínum egnu. Síðani hann kom til felagið í 1993, hevur talan verið um heilt nógvar dystir fyri felagið. Somikið nógvar, at hann væntandi kann halda 300 dystar jubileum í komandi kappingarári, og tað eru tað hóast alt ikki so nógvir, sum kunnu erpa sær av.

**- jm**